# Reglugerð fyri Listafólkabústaðin í Tjørnuvík

**Bygningurin**
Farið væl um! Bygningurin skal latast aftur í sama standi, sum tá hann varð útleigaður. Endurgjald verður kravt fyri skaðar á bygning, innbúgv og útbúnað.

**Royking**
Ikki er loyvt at roykja inni í bygninginum. Allir bygningar í Sunda kommunu eru roykfríir. Vinaliga virðið hetta.

**Húsdjór**
Tað er ikki loyvt at hava húsdjór við sær, tá ein býr á Listafólkabústaðnum.

**Internet**
Ókeypis internet er í bygninginum.
Netið eitur: Artists-Residence
Loyniorðið er: sundakommuna

**Rusk**
Rusk skal beinast burtur í grøna ruskílatið, sum stendur uttanfyri.

**Vaskimaskina**
Klæðir kunnu vaskast í vaskimaskinuni í fýrrúminum. Helst skulu klæðini turkast í baðirúminum ella í fýrrúminum.

**Framleiga**
Framleiga av bygninginum er ikki loyvd. Einans LISA hevur loyvið at leiga bygningin út.

**Framsýningar og tiltøk**
Listafólk eru vælkomin at bjóða bygdafólki inn til framsýningar og tiltøk, meðan búð verður á Listafólkabústaðnum.

**Gávur**
Tygum eru vælkomin at lata Listafólkabústaðnum eina gávu.
Kommunan tekur ímóti gávum, so sum málningar, prent, fotografi, bøkur o.a.
Ynskiligt er, at listafólkið/høvundurin signerar verkið og skrivar nær viðkomandi búði á Listafólkabústaðnum.
Verkini verða av og á sýnd fram á framsýning í Tjørnuvík. Á annan hátt verða verkini við til at prýða Listafólkabústaðin og aðrar kommunalar bygningar.
Gávan skal latast inn á kommunuskrivstovuni á Oyrarbakka.

**Henda reglugerð kemur í gildi 1. apríl 2018.**

______________________________
Heðin Zachariasen, borgarstjóri

**Hent at vita**
Kunning um nær bussurin koyrir sæst á www.ssl.fo.
Kunning um túrar í fjøllunum sæst á www.hiking.fo.
Kunning um kommununa sæst á www.sunda.fo.
Kunning um Føroyar sæst á www.visitfaroeislands.fo